Skemt



MYND: POLFOTO

# Vælsignaðu djór

Trúðarrørslurnar eru nógvar, og siðirnir ymiskir. Her er nakað, sum vit ikki kenna á okkara leiðum. Ein prestur í Spania vælsignar eina skjaldbøku. Tað verður gjørt á degnum hjá Skt. Anthony, sum var halgimenni hjá djórunum. Dagurin hjá honum verður brúktur til at samansjóða fólk og teirra kelidjór við kirkjuna. Sig so tað! Síggja tit ikki fyri tykkum, ein røð av hundum og kettum í einari føroyskari kirkju?

## Goyggjandi maður

Fyri 50 árum síðani – 2. februar í 1960 – var hesin tíðindastubbin at lesa í Sosialinum:

*Læknin Bocker í Onglandi sigur frá, at hann hevur lekt 65 ára gamlan mann, ið goyði sum hundur. Maðurin var lámur, tvingaður at skriva við høgru hond í skúlanum, goyði av og til sum yngru, men 63 ára gamal goyði hann støðugt og mátti fara úr arbeiðnum.*



ÍBÚÐ Í KEYPMANNAHAVN TIL LEIGU
21 rúms íbúð til leigu í 1/2 ár, evt. longri við tv & internetsamband.
Fult møblerað, 5.000 kr um mánaðin.
Ring og hoyr nærri

## Vorðið sum íbúð!

Nú ræður um at liggja fram við – og gera kvettið. Hendan lýsingin var at síggja í Gulu síðunum hjá Dimmalætting nú um dagarnar. Hetta líkist einum framúr góðum tilboði – og hvat kundi mann ikki brúkt alt hatta plássið til

## ÍRANGASTRÚPAN

**Var 2010 eisini í fjør?**
Ársins songrødd 2010 verður aftur í ár.
*Blaðið*

**Eisini teir?**
Læknar rýma úr Suðuroynni
*Sosialurin*

**Vorðið sum lyfti**
Vit fáa alt upp aftur
*Dimma*

**Køin má vera nakað long**
Nú sær trupult út hjá VB í Sunset
*Kringvarp.fo*

**Rudda forsíðuna!**
Tvílutfall í trimum stigum
*Dimma*

**Man tað verða til ítróttarkappingar?**
Sjóvar Havn fingið altjóða góðkenning
*Kringvarp.fo*

**Lova líka nógvum kvinnum og monnum inn?**
Rex slepti javnstøðulyftinum
*Dimma*

**Skip á aðalfundi**
Laksaskip valdu nevndina aftur
*Olivant.fo*

**Óvanligt!**
Opið stríð um finalusessin
*Dimma*

**Halda nýggjár mitt í januar**
KÍ-formaðurin: Nú byrjar árið hjá okkum
*Kringvarp.fo*

**Skipað leiting?**
Javnaðarveljarar leita eftir flokkinum
*Dimma*

## UMAFTURAFTURUM
## HØGNI DJURHUUS



# Banantøl

Tað loysir seg altíð, ja, tað átti at verið lógarkravt, at lesa, lesa gjølla, nærlesa og lesa eina ferð afturat rokningar og kontuavrit og keypsseðlar. Tí verri enn so altíð eru tølini røtt. Og skeivu tølini eru ongantíð tær til góðar.

Tá tú hevur funnið eitt ella fleiri tøl, sum tú ikki kannast við, er at fáa rokningina rættaða ella kontuavritið broytt ella spyrja, hví livradeiggið kostar ein triðing meira enn tilboðið skuldi eitast at vera.

Hetta kostar tær telefonsamrøður og tíð í arbeiðstíðini. Tí tey, sum senda rokningar og kontuavrit, eru bara at hitta um dagin

Men tú fært onga samsýning fyri tað.

Ein banki til dømis tekur pengar, ómaksgjald, ella tænastugjald skal tað vera ordiliga fínt, kalla tey tað, fyri alt, sum hann ger fyri teg, og eisini fyri tað, sum tú gert fyri bankan.

So eigur bankin sjálvandi, við gleði, at rinda okkum eitt ómaksgjald, hvørja ferð, vit noyðast at fáa rættað eitt kontuavrit, tí starvsfólk bankans ikki megna at avgreiða eina banala flyting uttan at flyta hana tvær ferðir ella taka ómaksgjaldið fýra ferðir.

Sjálvandi eigur bankin at gera tað. Men hann ger tað ikki. Tí bankin er ikki til fyri okkum. Vit eru til fyri bankan. Og sjálvandi eigur tað at kosta okkum, at vit eru til fyri bankan. Ómaksgjøld og rentumarginalur, trotarenta, rindar tú rentur og avdrátt ein dag ov seint. Eingin bónusrenta, um vit rinda ein dag ov tíðliga.

Ella skeivar rokningar, ongantíð tær til góðar, sum krevja tíð at fáa rættaðar. Tíð er pengar. Tí eiga vit at fáa pengar frá teimum, sum taka okkara tíð við skeivum tølum.

Brúkarar, tað eru vit øll, áttu at stovna eitt felag, sum krevur ómaksgjald frá peningastovnum og øðrum, sum bjóða seg fram fyri pengar at arbeiða fyri okkum og gera okkum tað, tey rópa tænastur. Og ikki duga, nei, duga alt ov væl, at skriva rokningar.

Vit kunnu ikki vænta, at bankarnir til dømis gera sær so stóran ómak fyri ómaksgjaldið, at mistøk, altíð teimum til góðar, ikki henda.

Ella handlarnir, sum dúgliga hvørja viku fylla postkassarnar við junkposti um tilboð oman á tilboð. Og »gloyma« at sláa tilboðini inn í kassatólini.

Tey, sum ikki varnast, at tey eru blivin snýtt, fyrr enn tey eru komin heim og lesa keypsseðilin, skulu so brúka tíð, beinsin ella disel, og orku at fara aftur í handilin og geva ilt av sær og krevja sín fulla rætt. Handilin letur einki ómaksgjald fyri hendan ómakin.

Ella felagið, sum fyri eitt rættiliga fitt ómaksgjald, átekur sær at umsita tína eftirløn og lýgur um teg fyri skattavaldinum.

Felagið hjá okkum brúkarum, sum verða havd til rukku hvønn einasta dag, átti at gjørt ein lista við okkara ómaksgjøldum. Til dømis skeiv tøl í kontuavritum, 50,00 kr. fyri hvørt skeiva talið. Tilboð, sum bara eru í lýsingabløðum, 100,00 kr. Ov stórar rokningar 10 prosent av tí, rokningin er ov stór. Kanska tey tá fáa fingurin út, um ikki annað so hálva leið.

Tak eisini spiltar ella hálvspiltar vørur, sum verða seldar fyri fullan prís. Tá seinasti søludagur ikki var í gjár ella fyrradagin, men í fjør einaferð.

Og so havi eg ikki nevnt øll tey, sum noyðast í rættin fyri at fáa sín rætt. Sum noyðast at kæra.

Eg sigi ikki, at Føroyar eru ein bananrepublikk. Tað er at gera ov nógv av. So langt eru vit ikki komin. Eg sigi, at Føroyar eru ein banankoloni.